Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Ár 2012, hin 19. juni kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Gunvá við Keldu, Óli M. Lassen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Jákup F. N. Mikkelsen, Signhild V. Joensen, Jórun Høgnesen, ið møtti fyri Óluvu Klettskarð, *Eyðun Jacobsen*, ið møtti fyri Steinbjørn O. Jacobsen, og *Maria Olsen*, ið møtti fyri Hans Arna Bertholdsen. Auðunn Konráðsson møtti ikki til fundin.

2012/086.
12/00583 Farloyvi frá býráðsarbeiðinum 2012 - Óluva Klettskarð

Frágreiðing um málið:
Í telduskrivi 11. juni 2012 boðar Óluva Klettskarð, býráðslimur, frá, at hon ikki verður heima til býráðsfundin 19. juni 2012.
Vísandi til grein 18, stk. 2 í kommunustýrislógini, verður næsti tøki limur á listanum, sum er Jórun Høgnesen, at taka sæti í býráðnum í hennara stað til hendan býráðsfundin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at Jórun Høgnesen tekur sæti í býráðnum fyri Óluvu Klettskarð.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt, og Jórun Høgnesen tók sæti í býráðnum.

2012/087.
12/00606 Farloyvi frá býráðsarbeiðinum 2012 - Steinbjørn O. Jacobsen

Frágreiðing um málið:
Í telduskrivi 14. juni 2012 boðar Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur, frá, at hann ikki verður heima til býráðsfundin 19. juni 2012.
Vísandi til grein 18, stk. 2 í kommunustýrislógini, verður næsti tøki limur á listanum, sum er Eyðun Jacobsen, at taka sæti í býráðnum í hansara stað til hendan býráðsfundin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at Eyðun Jacobsen tekur sæti í býráðnum fyri Steinbjørn O. Jacobsen.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt, og Eyðun Jacobsen tók sæti í býráðnum.

2012/088.
12/00372 Farloyvi frá býráðsarbeiðinum 2012 – Hans Arne Bertholdsen

Frágreiðing um málið:

Í telefonsamrøðu 14. juni 2012 boðar Hans Arne Bertholdsen, býráðslimur, frá, at hann ikki verður heima til býráðsfundin 19. juni 2012.
Vísandi til grein 18, stk. 2 í kommunustýrislógini, verður næsti tøki limur á listanum, sum er Maria Olsen, at taka sæti í býráðnum í hansara stað til hendan býráðsfundin.

Tilmæli:
Mælt verður til, at Maria Olsen tekur sæti í býráðnum fyri Hans Arna Bertholdsen.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt, og Maria Olsen tók sæti í býráðnum.

2012/089.
12/00530 Skattafrælsi til vælgerandi arbeiði

Frágreiðing um málið:
Borgari hevur í skrivi, dagfest 5. mars 2012, søkt um skattafrælsi. Hann greiðir frá, at hann hjálpir eini samkomu í Póllandi sum sjálvboðin, og at hann fær stuðul frá vinum og samkomuni Karis í Klaksvík. Víst verður annars til skriv hansara. Sambært grein 1 stk. 1 í skattalógini kunnu persónar, sum hava inntøku frá kirkjuligum ella manngóðum endamáli, fáa skattafrælsi.

Tilmæli:
Klaksvíkar Kommuna hevur einki at viðmerkja til umsóknina hjá borgaranum um at fáa skattafrælsi í samband við, at hann útinnir vælgerandi arbeiði í Póllandi.

FíN 13. juni 2012: Nevndin tekur undir tilmælinum frá umsitingini, dagfest 1. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/090.
11/00290 Møgulig bussleið í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini dagfest 1. juni 2012 er ein fyribils leistur lýstur fyri, hvussu ein bussleið kann skipast í Klaksvík. Í høvuðsheitum verður skotið upp at hava tvær leiðir: leið 1 Eystur og leið 2 Vestur, og skulu hesar eisini røkja skúlabarnaflutning og aðrar líknandi tænastur. Mælt verður til, at bussskipanin verður ókeypis hjá borgarunum at brúka.
Mett verður, at kostnaðurin fyri bussskipanina fyri eitt ár er á leið 2,5 - 3,0 mió. kr. Hesi tøl skulu tó takast við fyrivarni. Hvussu skipanin skal fíggjast er ein politiskur spurningur.

Tilmæli:
Málið verður lagt fyri nevndirnar til umrøðu og møguliga støðutakan, um tað skal farast víðari í samráðingar/útbjóðing av eini busskipan í Klaksvíkar kommunu – Klaksvík, Ánirnar, Árnafjørður og Norðoyri.

Um umrødda bussskipan ikki verður sett í verk nú eftir summarsteðgin, men kanska heldur 1. januar 2013, eftir eina avseting á fíggjarætlanini til endamálið, so verður mælt til, at verandi skúlabarnaflutningsskipan heldur fram til 31. desember 2012.

MeN 6. juni 2012: Nevndin mælir til, at skúlabarnakoyringin verður boðin út, og at býbussskipanin verður at taka upp í sambandi við viðgerðina av komandi fíggjarætlan.

FeN 11. juni 2012: Nevndin tekur undir við Mentanarnevndini 6. juni 2012.

TN 12. juni 2012: Nevndin tekur undir við viðtøkuni hjá MeN dagf. 6. juni 2012.

FíN 13. juni 2012: Nevndin tekur undir við Mentanarnevndini 6. juni 2012, Ferðslunevndini 11. juni 2012 og Teknisku Nevnd 12. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/091.
12/00496 Uppskot til lestraríbúðir í miðbýnum

Frágreiðing um málið:
Býráðslimirnir Elsebeth M. Gunnleygsdóttur og Jógvan Skorheim skjóta í skrivi dagfest 8. mai 2012 upp at kanna møguleikarnar fyri at byggja lestraríbúðir í miðbýnum til skjótt vaksandi tørvin á økinum. Skotið verður upp at
- kanna møguleikarnar fyri at byggja lestraríbúðir í miðbýnum
- farið verður undir at gera ein sjálvsognarstovn
- vit seta okkum í samband við Húsalánsgrunnin viðvíkjandi fígging
- uppskot til loysnir skulu fyriliggja seinasta lagi 1. august 2012

Tilmæli:
Mælt verður til:
1 at miðað verður móti nýbygging so nær Tekniska Skúla og ítróttarøkinum annars, sum til ber
2 at talan verður um í minsta lagi 100 íbúðir – smærri og størri
3 at skipaður verður ein sjálvsognarstovnur, sum fremur ætlanina, har kommunan saman við vinnuni og møguliga Tekniska skúla skjóta rímiliga stóra upphædd inn, so lánibyrðan verður so lagalig, sum til ber – og leigugjaldið har eftir
4 at býráðið útvegar lendi til byggingina og ger tað byggibúgvið við øllum neyðugum kloakk- og øðrum leiðingum annars.
5 at ein byggibólkur verður settur at lýsa málið betri – í hesum sita: formaðurin í Sosialu nevnd, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, formaðurin í Mentanarnevndini, Jógvan Skorheim, kommunustjórin, byggifulltrúin og leiðari á Mentanardeildini.

SoN 6. juni 2012: Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá umsitingini, og at Óluva Klettskarð og Tonja Ziskason eisini verða við í arbeiðsbólkinum.

MeN 6. juni 2012: Nevndin tekur undir við SoN 6. juni 2012 – tó verður byggibólkurin at taka støðu til staðseting og vavi.

FíN 13. juni 2012: Ein minniluti í nevndini, Steinbjørn O. Jacobsen, tekur í fyrstu atløgu ikki undir við málinum, vísandi til, at kommunan í løtuni hevur so nógvar aðrar áleikandi íløgur at taka sær av. Ein meiriluti í nevndini, Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Óli M. Lassen og Signhild V. Joensen, tekur undir við Sosialu Nevnd 6. juni 2012 og Mentanarnevndini 6. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Samtykt at taka undir við Sosialu Nevnd, Mentanarnevndini og meirilutanum í Fíggjarnevndini.

2012/092.
12/00395 Kommunalar veitingar - Summarfestivalurin 2012 – *flyting mill. kontubólkar, 1. viðgerð*
(partur av 12/00179 Útgreining av íløgum mentanarøkið – stuðul 2012)

Frágreiðing um málið:
Fíggjarnevndin beinir 23. apríl 2012 málið aftur til umsitingina við umbøn um, at ásett verður, hvussu málið [um fígging av kommunalum veitingum til Summarfestivalin 2012] skal fíggjast.

Tilmæli:
Mælt verður til, at íløgukonto *Bygdafelagið Báran, bygging av felagshúsi* (mál 12/00179) verður umraðfest soleiðis:

Keyp av elveitingarútbúnaði í miðbýnum

a)	Íbindingarstøð við Føroya Tele - talva, kaðal, etc.	
b)	Íbindingarstøð við Vágstún - talva, kaðal, etc.	
c)	Íbindingarstøð við Skýlið - talva, kaðal, etc.	kr. 320.000,-
d)	Bygging av Bláa Skýlinum	kr. 1.200.000,-
e)	Umvæling av lofti Isenkram	kr. 430.000,-
		kr. 1.950.000,-

MeN 6. juni 2012: Nevndin mælir til, at stuðulin til Báruna ikki verður goldin í ár og tí verður umraðfestur. Mentanarnevndin er samd um, at kr. 1.950.000,- verða settar av á fíggjarætlanina fyri 2013. (*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av stuðlinum til Báruna.)*
Nevndin tekur undir við teirri raðfesting, sum sett er upp í tilmæli fra Mentanardeildini 4. juni 2012. Verkætlanin við skýlinum er treytað av, at kostnaðarmetingin heldur, og at kommununnar partur ikki verður meir enn upplýst í skjali 6. juni 2012, sum kommunustjórin hevur skrivað í samráð við FuglArk. (Víst verður annars til mál nr: 12/00179 í sambandi við umraðfestingina.)

TN 12. juni 2012: Nevndin tekur undir við tí tekniska partinum av málinum.

FíN 13. juni 2012: Nevndin tekur undir við Mentanarnevndini 6. juni 2012 og Teknisku Nevnd 12. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Atli S. Justinussen, býráðslimur, luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

2012/093.
11/00916 Tilmæli um skúlabygging - byggibólkur fyri Ziskatrød

Frágreiðing um málið:
Byggibólkur varð settur at koma við uppskoti um bygging av nýggjum skúla á Ziskatrød.
Álitið frá hesum bólki hevur verið til viðgerðar í Mentanarnevndini 22. mai 2012, har nevndin býtti seg í ein minniluta og ein meiriluta.
Biðið varð um at fáa útgreinað neyvari tann partin, sum umtalar bygging ið
- *víst verður til tilmælið frá umsitingini 15. mai 2012*
- *víst verður til Mentanarnevndarviðtøkuna 22. mai 2012*
- *víst verður til Byggiskránna frá Byggibólkinum*
- *víst verður til upprit: "Útgreining av skúlunum sum samstarva" frá MAP Arkitektum 31. mai 2012*

Tilmæli:
Umsitingin heldur seg til tilmælið 15. mai 2012. Nevndirnar verða við støði í meirilutatilmælinum frá fundi í Mentanarnevndini 22. mai 2012 at taka støðu til, um bygt skal verða eftir einum leisti
1. fyri 105 mió. kr. - ein sjálvstøðugur skúli
2. fyri 68 mió. kr. - ein skúli, sum samstarvar við hin skúlan

MeN 6. juni 2012: Óluva Klettskarð viðmerkti umvegis telefon, at ein skúli uttan serstorvur er ikki ein sjálvstøðugur skúli, og er hetta heldur ikki í tráð við fólkaskúlalógina.
Ein minniluti, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, tekur støðu til málið í Býráðnum.
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Atli S. Justinussen og Jákup F. N. Mikkelsen, mælir til:
1. at fyriliggjandi tíðarætlan skal vera leisturin fyri framhaldandi arbeiði
2. at fyriliggjandi fíggjarætlan skal vera grundarlagið fyri komandi íløguavseting fyri skúlabygging fram til 2016
3. at bygdur skal verða ein sjálvstøðugur skúli, har lagt verður upp til eitt samstarv og byggjast hareftir
4. at byggibókurin heldur fram til eitt dispositiónsuppskot fyriliggur, sum skal vera grundarlagið fyri teirri projektering og útbjóðing, ið skal fremjast.

TN 12. juni 2012: Ein minniluti, Jógvan Skorheim, tekur undir við viðtøkuni hjá MeN 6. juni 2012.
Ein samd Teknisk Nevnd mælir til at heita á FuglArk, saman við bygginevndini, um gerð av disposisjónsuppskoti grundað á tveir sjálvstøðugar skúlar við serstovum eftir tørvi, bygdur í stigum og í samsvari við skúlabyggingina í økinum.

FíN 13. juni 2012: Nevndin tekur undir við byggiskránni, dagfest apríl 2012, sum Mentanarnevnd býráðsins hevur tikið stig til at gera, og at arbeiðið byrjar sambært tilmælinum, men at tíðarætlanin annars verður lagað eftir fíggjarorku kommununnar. Nevndin tekur somuleiðis undir við Teknisku Nevnd býráðsins um at heita á FuglArk, saman við bygginevndini, um gerð av disposisjónsuppskoti, grundað á tveir sjálvstøðugar skúlar við serstovum eftir tørvi, bygdur í stigum og í samsvari við skúlabyggingina í økinum.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 13. juni 2012 samtykt, og at byggibólkurin í víðari arbeiðinum tekur tørvin á Serdeild við í lýsingina av málinum.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

2012/094.
12/00467 Sundurbýti av matr. nr. 69 í Árnafirði

Frágreiðing um málið:
Søkt verður um sundurbýti sambært umsókn móttikin 23. apríl 2012.

Tilmæli:
Tekniska Umsiting hevur onki ímóti, at sundurbýtið verður játtað.

TN 12. juni 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 1. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/095.
12/00527 Gøtuljós - meirnýtsla - *eykajáttan, 1. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Hækkaðu útreiðslurnar til SEV frá kr. 1,28 til 1,38 fyri kwh eru bundnar. Víst verður til viðlagda uppgerð frá 1. juni 2012, ið vísir, at tá hædd er tikin fyri SEV og øðrum útreiðslum, eru bert kr. 17.500,- eftir til viðlíkahald. Umsitingin metir hetta vera ov lítið, tí tørvurin á viðlíkahaldi er stórur. Víst verður eisini á, at gøtuljósini í Mikladali, Trøllanesi og Svínoy er ógvuliga dýr at viðlíkahalda. Í løtuni er alt viðlíkahaldsarbeiði steðgað, tí verður biðið um at fáa eykajáttan.
Víst verður annars til viðlagda útgreining av avseting.

Fíggjarligar avleiðingar:
Sum nevnt, er talan um eina tilmælta øking av avsetingini til rakstur í inniverandi ári, ið sostatt ger rakstrarúrslitið fyri árið samsvarandi verri. Hetta er sjálvandi alt annað enn heppið, men samstundis er tað undir ongum umstøðum í tráð við nakran veruleika, soleiðis sum støðan er nú, har bert kr. 17.500,- eru eftir av játtanini til viðlíkahald av gøtuljósum kommununnar, ið sum kunnugt – umframt Klaksvíkar bý – nú fevnir um eitt vaksandi tal av bygdum og oyggjum.

Tilmæli:
Mælt verður til at hækka viðlíkahald úr nevndu kr. 17.500,- upp í kr. 300.000,- svarandi til eina hækking á kr. 282.500,- sum verður at fíggja av tøkum peningi, tí umsitingin hevur onga kontu at vísa á, haðani henda tørvandi játtan kann flytast.

TN 12. juni 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 1. juni 2012.

FíN 13. juni 2012: Nevndin tekur undir við Teknisku Nevnd 12. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

2012/096.
12/00555 Økið kring frítíðarskúlan, Snjallubjallu - *eykajáttan, 1. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Ein bólkur hevur umrøtt økið, sum er ímillum Snjallubjallu og Ósáskúlan. Jórun Høgnesen frá Ósáskúlanum bjóðaði Beintu Klakstein, leiðara í Snjallubjallu við, har tey í felag umrøddu ætlanir at gera eitt felagsøki, sum eisini kundi verða sum alment spælipláss. 700.000 kr blivu játtaðar til hetta endamál. Men tað vísir seg nú, at upphæddin bert er ætlað til at gera garðin í Ósáskúlanum.
Tað vildi verið skilagott og helst eisini bíligari fyri kommununa, at alt verður gjørt um somu leið.
Fyri at ætlanin um eitt felagsøkið ikki skal detta burtur, metir umsitingin, at ein upphædd á 350.000 kr. kann finnast við flyting millum kontur og av spardum pengum undir verkfallinum.
150.000 kr kunnu verða fluttur frá Barnaansing, Felags "Størri umvælingar, bygningar" og 200.000 kr frá spardum verkfalspeningi.

Tilmæli:
Mælt verður til, at játtaðar verða 350.000 kr til at gera partin hjá Snjallubjallu av felagsøkinum ímillum Snjallubjallu og Ósáskúlan. 150.000 kr verða fluttar frá Barnaansing, Felags "Størri umvælingar, bygningar" og 200.000 kr frá spardum verkfalspeningi.

SoN 6. juni 2012: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini um at taka kr. 150.000,- av Barnaansing, Felags "Størri umvælingar, bygningar", og at taka restina við í fíggjarætlanararbeiðið fyri 2013.

FíN 13. juni 2012: Nevndin tekur undir við Sosialu Nevnd 6. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Jórun Høgnesen, býráðslimur, luttók ikki í viðgerðini av málinum, vegna ógegni.

2012/097.
12/00423 Framtíð Klaksvíkar Róðrarfelags - *Flyting millum høvuðskontur, 1. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Kl. Býráð samtykti á fundi 29. mai 2012 at hækka stuðulin til Klaksvíkar Róðrarfelag við 30 tús. kr.

Tilmæli:
Vísandi til býráðsviðtøku 29. mai, har samtykt er, at stuðulin verður hækkaður við kr. 30.000,- verður mælt til, at peningurin verður fluttur av "Klaksvíkar Søga" til "Stuðul ítróttur".

MeN 6. juni 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini 1. juni 2012

FíN 13. juni 2012: Nevndin tekur undir við Mentanarnevndini 6. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Jórun Høgnesen, býráðslimur, luttók ikki í viðgerðini av málinum, vegna ógegni.

2012/098.
12/00495 Umsókn um hækkan av játtanini 2012 til Sambýlið á Heygnum – *flyting millum kontur, 2. viðgerð.*

Frágreiðing um málið: Málið varð samtykt fyrru ferð av býráðnum 29. mai 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/099.
12/00359 Nýggir útsøluprísir, 2012 – Grótbrotið

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundinum 1. mai 2012 samtykti býráðið at beina máilð aftur í Teknisku Umsiting at útgreina og lýsa, hvussu ein útdelegering av heimildini at áseta prísirnar hjá Grótbrotinum kann verða framd, og at at leiðarin av Grótbrotinum verður hoyrdur.

Í skrivi, dagfest 24. mai 2012, mælir býarverkfrøðingurin til:
a) at taka undir við uppskotnu útsøluprísunum frá leiðaranum í grótbrotinum sum lýstir í tilmælinum frá 3. apríl og smávegis broyting lýst í notati dagfest 27. apríl 2012 (fyllisandur skal heldur kosta 140 kr. v/mvg enn 99 kr. v/mvg) og
b) at leiðarin á teknisku umsiting saman við leiðaranum í grótbrotinum fáa heimild at áseta prísirnar, soleiðis at skiftisavlopið altíð verður millum 20 og 25 %.

Fíggjarligar avleiðingar:
Av tí at tað er vorðið dýrari at keypa tilfar inn, og oljan er hækkandi, verður ikki roknað við stórvegis hægri inntøku til grótbrotið, og tí kann málið um áseting av útsøluprísum metast at vera neutralt, tá hugsað verður um fíggjarætlanina.

TN 12. juni 2012: Nevndin mælir til, at TU og leiðarin í grótbrotinum gera tilmæli til TN um sølukostnaðir hjá grótbrotinum.

FíN 13. juni 2012: Nevndin tekur undir við Teknisku Nevnd 12. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini samtykt.